## GLASMONTØR

Søkt verður eftir glasmontøri, at byrja skjótast tilber.

Talan er um eitt fjølbroytt fulltíðarstarv, ið bæði fevnir um vanliga rúta ísetan og montering av størri glaspartíum.

***Vend tær til:***
Atlanticpane, tlf 421405 og tosa við Árna Svartafoss, ella maila á info@atlanticpane.fo

*Vit bíða eftir tær!*

Atlanticpane
FO-410 KOLLAFJØRÐUR

## Leyst starv

Meginfelag Búnaðarmanna sóknast eftir einum fólki til starv í framleiðsluni og goymsluni á mjólkarvirkinum.

Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunnleiki til teldur er ein fyrimunur, tó eingin treyt.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og spennandi arbeiði, starvið er lønt eftir sáttmál amillum Føroya Arbeiðsgevarafelag og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. september og stílast til:

**L/F Meginfelag Búnaðarmanna**
Postrúm 3088
FO-110 Tórshavn
Merkt: Umsókn

Byrjast skal 1. oktober, ella eftir avtalu.

Vilja tit vita meira um starvið, ber til at venda sær til Øyvind Hentze, virkisleiðara á tlf. 30 90 00.

MBM

## Læknaskrivari

1 starv sum læknaskrivari 3/4 tíð er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum læknaskrivari ella annar líknandi førleiki
- Teldukunnleiki á basalum støði
- Fyrikomandi

**Løn:**
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja er úti 24. september 2006. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til viðtaluna á tlf. 313700. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, CV og møguligum viðmælum kunnu sendast til:

**Kommunulækni Kári Jacobsen**
**J. Paturssonargøta 22**
**FO-100 Tórshavn**

## Skrivari í Fuglafjarðar skúla

Søkt verður eftir skúlaskrivara í Fuglafjarðar skúla at arbeiða parttíð (0,75) frá 1. november 2006 at rokna.

**Søkt verður eftir skrivara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans kann avgreiða fyrisitingarligu uppgávur skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- er stundisligur og nærlagdur

Harafturat skal skrivarin av og á kunna arbeiða í skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikakrøv:**
Tann, ið verður settur í skrivarastarvið, skal hava góðan málførleika eins og neyðugt er at hava góðan førleika at nýta teldu.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi 25. september 2006 kl. 15.00.

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 444087 ella 214087. Eisini ber til at senda teldupost til skúlastjóran: suni@ffs.fo

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 4. september 2006
**Fuglafjarðar kommuna**

*Fuglafjarðar skúli hevur umleið 335 næmingar í 19 flokkum. við skúlan starvast 34 lærarar, 1 stuðul, 1 skrivari, 1 húsavørður og 4-5 reingerðingarfólk. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo*

## Nýtt motorsúkkluskeið



Nýtt motorsúkkluskeið byrjar tórsdag tann 14. september kl.19:00.

**Tvøroyrar teori og koyriskúli**
Áki Dimon, Tvøroyri
Tlf. 22 14 63 / 37 11 80

## Starv sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkiliði

Starvið sum leiðari fyri Fuglafjarðar sløkkilið, sum er ein deild av Fugalfjarðar kommunu, verður hervið lýst leyst til setan tann **1. desember 2006** ella skjótast eftir hetta.

**Krøv:**
- Viðkomandi skal hava handverksliga ella byggifrøðisliga útbúgving
- Skal hava tikið ella skal taka neyðug skeið sambært kunngerð um útbúgving av sløkkiliðsmanningum og brunaumsjónarmonnum
- Skal vera við til at menna kommunala brunaverkið og brunamenninar, so sløkkilið altíð er á einum tekniskt forsvarligum støði
- Heilsuváttan verður kravd
- Skal hava stóra koyrikortið
- Skal hava góð samstarvsevni

**Lønar- og setanarveiðurskifti:**
- Starvið, sum verður normerað til 15 tímar um vikuna, verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið
- Fyrstu 3 mánaðarnir verða at rokna sum royndartíð.

**Nærri upplýsingar**
um starvið kunnu fáast við at venda sær til Gordon M. Petersen, sløkkiliðsleiðara á tlf. 220101 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

**Umsóknarfreist:**
Skrivligar umsóknir saman við próvskjølum skulu vera

**Fuglafjarðar býráð**
Norður í Gerði 10B
530 Fuglafjørður

í hendi í seinasta lagi **hósdagin tann 21. september 2006 kl. 16.00.**

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Nærri upplýsningar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Gordon M. Petersen, brunaumsjónarmann á tlf. 220+101 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

Fuglafjørður, tann 6. september 2006

**Fuglafjarðar býráð**

## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800